ÚT AT KOYRA

Suzuki Ignis

Suzuki kemur á evropeiska markna›in næsta ár vi› einum n‡ggjum Ignis, i› er ein 4x4 persónbilur, sum í stødd er millum Suzuki Swift og Baleno.

Kelda: Motor Magasinet

A4 í Keypmannahavn

Á bilaframs‡ningini "Copenhagen International Motor Show", i› letur upp 8. november, ver›ur ein Audi A4 vi› heilt n‡ggjum designi s‡ndur fram.

Kelda: Bilen Motor & Sport

Saab Variable Compression

General Motors, sum eigur Saab, ætlar eisini at brúka Saab uppfinningina vi› motorum vi› variablari kompressión, i› er ein tøknilig kollvelting, til teir amerikansku GM bilarnar.

Kelda: Motor Magasinet

Mitsubishi Canter – kranabilur til lítla koyrikorti ›

Mitsubishi Canter FE531E vi› krana

Mitsubishi Canter ver›a gjørdir í nógvum útgávum, til dømis sum kølivognar, vanligir kassavognar, sement blandarar, sleipibilar, lastbilar vi › vippu, renovatiónsbilar og bingjubilar.

Magnus Gunnarsson

Canter FE531E

Hesin er Canter FE531E, er tann minsti í Canter rø›ini, sum fæst í ymiskum støddum og til ymisk endamál. Ta› sum er áhugavert vi› hesum lastbilinum er, at hóast hann hevur krana, er hann ikki størri enn at hann kann koyrast vi› lítla koyrikortinum.

Eginvektin er 2550 kg og mesta last er 950 kg, so totalvektin er 3500 kg.

2.8 turbodiesel

Mitsubishi Canter ver›ur gjørdur í støddum frá 3,5 tons til 6,3 tons totalvekt. Hann fæst eisini vi› dupultari kabinu. Bilurin er sera snøggur, bæ›i innan og uttan, og er gó›ur at koyra. Motorurin á hesum bilinum er ein 4 syl 2.8 litur turbodiesel, me›an tann størri motorurin er 3.9 litur. Innan er hann sum ein persónbilur, har alt situr har ta› skal, og er lætt at handfara. Frá bilasøluni hjá Ivan Johansen ver›ur sagt at Mitsubishi Canter eru kappingarførir í dygd og prísi, og áhuga›i eru vælkomin at fáa eitt óbindandi tilbo›, alt eftir hvat bilurin skal brúkast til.

Hyundai Trajet – nú vi› sjey sitiplássum

Magnus Gunnarsson

Eftir at Hyundai Trajet Pro-Van hevur veri› á markna›inum sum vøruvognur í eina tí›, kemur hann nú sum persónbilur vi› sjey sitiplássum.

Stórur familjubilur

Markna›urin fyri nútímans luksus MPV bilar hevur veri› vaksandi seinastu árini. Nú kemur so Hyundai Trajet Pro-Van sum er ein bilur til stórar familjur, og tey sum vilja hava meira pláss. Kabinan er rúmlig, li›iligt innrætta› vi› sjey sitiplássum, harav tey fimm aftastu kunnu takast út uttan trupulleikar, um bilurin skal brúkast sum vøruvognur. Eisini kunnu nøkur av setrunum leggjast saman, so møguleiki er at n‡ta tey sum bor›, eitt nú á longri túrum.

Nógv standardútger ›

Trajet er væl innrætta›ur, solei›is at tey fer›andi sita so gott sum gjørligt, og setrini eru arbei›sliga rætt tilevna›i. Bilurin hevur nógva standard útger›, so sum ABS bremsur vi› EDB, forlyktir vi› multifokus reflektor, dupultan "depowered" airbag, sum minkar um vandan fyri ska›a á persónar sum sita framman í bilinum, eins og sentrallás, el-rútar framman og aftan og el-sí›uspegl.

Frá Nordbil frættist at ein 2.0 litur í GL útgávuni og 138 hk kostar kr. 257.750,- og at fyrst í komandi ári fáa teir Trajet heim vi› dieselmotori.

Hyundai Trajet kemur nú sum persónvognur vi› sjey sitiplássum

ÚT AT KOYRA

Berlingo 2.0 HDi – vi › dragihur›um á bá›um sí›um

Magnus Gunnarsson

Citroën Berlingo er úrslit av eini felags verkætlan hjá Citroën og Peugeot, undir lei›slu av Ciroën. Frá byrjan av vór›u Berlingo og Peugeot Partner gjørdir bæ›i sum persón og vørubilar. Sigast má at hesir bilar hava ver›i sera væl móttiknir, og fleiri bilverksmi›jur koma nú vi› bilum at kappast í hesum klassanum.

Rúmligur bilur

Berlingo er ein rúmligur bilur, i› hóskar væl til barnafamiljur, sum ikki halda seg til at keypa ein stóran MPV ella annan frítí›arbil. Eitt hav av plássi, gó›ir og tryggir koyrieginleikar, umfatandi standardútger› og ein kappingarførur prísur, ger Citroën Berlingo til ein annarlei›is møguleika enn tann vanliga familjubilin. Bilurin hevur gott pláss til fimm vaksin fólk, og eitt stórt vi›førisrúm, har ein barnavognur passar inn uttan at skula leggjast saman. Eisini er møguleiki at seta tvey eykasetur aftast, so pláss ver›ur til 7 fólk. Berlingo er ein bilur sum bæ›i førarin og tey fer›andi trívist væl í, tí hann er gó›ur at koyra, er væl isolera›ur. Eisini eru fleiri møguleikar til at leggja smáting frá sær.

Dragihur›ar bá›umegin

Tá Berlingo fyrstu fer› bleiv royndarkoyrdur av FDM fyri gó›um trimum árum sí›an, fekk hann sera gott ummæli, men teir f‡ltust á at 1.4 litur motorurin var ov lítil til bilin, og at hann bert hev›i eina dragihur› høgrumegin til baksetrini. Hetta hevur Citroën bøtt uppá, vi› ta› at bilurin nú hevur dragihur›ar á bá›um sí›um, sum gera bilin upp aftur meira brúkaravinarligan.

2.0 HDi dieselmotor

Naka› eftir at Berlingo var komin á markna›in vi› 1.4i motorinum, kom ein 1.8i motorur, sum hev›i kraftina sum hin mangla›i. Sí›an kom ein 1,9 litur dieselmotorur vi› 71 hk, og nú hevur hann tann n‡ggjasta 2,0 litur HDI turbodiesel-motorin vi› common rail tøkni og beinlei›is innspræning. Hetta gevur betri nyttu av brennievninum, motorurin er meira ljó›leysur og dálkar minni.

Citroën gevur 3 ára garanti móti verksmi›jubrekum í tilfari og lakkinum, og 12 ára garanti móti gjøgnumtering.

Berlingo fæst nú vi› dragihur›um á bá›um sí›um

Vi›førisrúmi› er so stórt, at ein barnavognur passar inn uttan at skula leggjast saman

Berlingo er ein bilur, sum bæ›i førarin og tey fer›andi trívast væl í

Citroën Berlingo SX 2.0 HDi

Motorurin	4 syl. 2.0 litur 90 hk turbodiesel v. common rail og innspræning
0-100 km/t	15,3 sek.
Oljun‡tsla	18,2 km/l
Dekkstødd	175/65-14
Stødd og vekt	
Longd	410,8 cm
Breidd	171,9 cm
Hædd	180,2 cm
Eginvekt	1250 kg
Totalvekt	1925 kg
Prísur	Persónbilur kr. 176.000,- Vørubilur kr. 147.000,-
Søluumbo›	Ivan Johansen Bilar Hoyvíksvegur 63 FO-100 Tórshavn Tlf. 313666